gult cyan magenta svart



# Minniluta-uppskot ørkymlað grunnin

*Ný Carlsberg grunnurin hevur ikki viljað sent koltursmilliónirnar til Føroya, tí eitt minnilutauppskot frá Mortan Winther Poulsen hevur ørkymlað grunnin*



*Ætlaðu milliónirnar til koltursbóndan eru fyribils lagdar inn aftur í pengaskápið hjá Ný Carlsberg grunninum*

DIA MIDJORD

Seks fólk hava mannað ráðleggingarbólkin fyri Koltur, og trý teirra hava undirskrivað uppskotið hjá minnilutanum Mortan Winther Poulsen - eitt nú formaður og skrivari.

Ný Carlsberg grunnurin vísir serliga til hetta uppskot í brævinum til Koltursbóndan og harmast um, at pengingastuðulin á 2 milliónir fellur burtur.

- Viðurskiftini er so mikið ógreið í løtuni, at vit meta ikki, at arbeiðið í Koltri kann gerast sum ætlað, stendur í brævinum til Koltursbóndan.

### Ikki mín skyld

– Tað er ikki rætt at geva mær skyldina fyri, at pengarnir ikki koma hendavegin. Eg havi einans gjørt eitt minnilutauppskot, sigur Mortan Winther Poulsen, ið umboðað hevur Forngripafelagið í ráðleggingarnevndini fyri Koltur.

Í uppskotinum vísir Mortan Winther Poulsen á, at málið um at privatisera landsjørðina aftur hevur verið í løgtinginum:

– Vit eiga ikki at vera viðvirkandi til, at danskir stuðulsgrunnar framhaldandi seta pening í fornminni í Koltri, sum um stutta tíð kunnu gerast privat ogn. Tað er skylda okkara at kunna teir um hetta, stendur eitt nú í minnilutauppskotinum.

# Modellið av Norrönu seinasta royndartúr




*Sjey metrar langa modellið av nýggju Norrönu skal í morgin standa sína endaligu roynd í Hamburg*

DIA MIDJORD

Óli Hammer, stjóri á Smyril Line, og skipari og maskinsjefur á Norrönu verða til staðar, tá sjey metur langa mini-modellið av nýggju Norrönu fer sín tíggjunda og seinasta túr í royndartanganum í Hamburg.

– Tað er ikki vanligt, at modellini er so ofta í royndartanganum. Men av tí at vit hava lagt doyðin á, at minst møguligt av larmi og ristingum skulu vera, mugu so nógvar royndir gerast, sigur Óli Hammer, stjóri á Smyril Line.

Smyril Line hevur havt ein svenskan serfrøðing at hjálpa sær í hesum sambandi. Á hesum seinasta túrinum í morgin, fáa so umboðini fyri Smyril Line staðfest, hvussu ristingin og larmurin verða, tá 30.000 hestakreftir flyta Norrönu við 21 sjómílum um tíman.

## Sigldu slakar tólv milliónir í kassan

*Avlopið hjá Smyril Line í fjør var 11,5 milliónir. Hetta er nakað minni enn árið frammanundan*

Á ársaðalfundinum hjá p/f Smyril Line týsdagin, bleiv øll nevndin afturvald.

Avlopið hjá felagnum var 11,5 milliónir í fjør. Hetta talið er hálvatriðju millión minni enn árið frammanundan.

Í tíðindaskrivi verður sagt, at leiðslan er greið yvir, at Norröna er vorðin ov lítil til tørvin í summarhálvuni. Tískil er man farin undir at byggja eina nýggja Norrönu, sum eftir ætlan skal verða liðug og avloysa verandi Norrönu á vári 2002.

**dia**

# Nøkur lyklatøl

Tú kanst við nýggja skipinum ferðast „bíliga“ og tú kanst eisini ferðast sum ein greivi. Skipið hevur eina svitu, 12 luksuskømur, 299 kømur í ymsari støðd og 6 kømur til rørslutarnað. Umframt eru eisini 324 couchettir á 70 kømrum.

Mest loyvda ferðafólkatal er 1482 og mest loyvda manningartal er 118. Skipið kann taka um 800 persónbilar ella 130 trailarar á 14 metrar.

Á leið 1000 sitipláss eru. Og vilt tú ikki sita niðri, kanst tú stytta tær stundir í vøddavenjingarrúminum á niðasta dekki. Her kanst tú eisini svimja og fara í gosbað ella sauna. Og Smyril Line bjóðar eisini teim ferðandi gott veður, tí solarium er umborð.

Fýra høvuðsmotarar geva skipinum eina ferð á leið 21 sjómíl um tíman. Skipið er 163 metrar langt , 30 metrar breitt og tað stingur 6 metrar.



*Óli Hammer, stjóri á Smyril Line, er stak væl nøgdur við nýggja skipið, ið skal avloysa verandi Norrönu á várið 2002*

### Eta hvør sær

Har afturi á sætta dekkinum finst matstovan, har borðreitt verður við køldum borði og a la carte. Henda matstovan er býtt sundur í tvey, so fólk, ið eitt nú njóta ein góðan enskan búff, ikki verða órógvað av fólki til og frá kalda borðinum.

Sambært Smyril Line er tað av royndum, at matstova og barr eru plaserað har afturi á skipinum.

Gerst tú svangur, meðan tú liggur á sóldekkinum, so finnast eisini ráð fyri tí. Ein sølubúð, har tú kanst keypa tær okkurt leskandi og okkurt lætt at eta, verður á sóldekkinum.

**Lesið eisini Sosialin á Internetinum**
**www.sosialurin.fo**

gult cyan magenta svart



# Nýtt føroyskt mánaðarblað

*Glaðing er heitið á snotuliga og dygdargóða føroyska mánaðarblaðnum, sum fimm føroyskir journalistar hava tikið stig til at geva út*




JOHN JOHANNESSEN

Nýggja føroyska mánaðarblaðið, Glaðing, var at síggja á hillunum í sølubúðunum í gjár. Talan er um eitt litblað í sokallaðari magasinstødd, og er tað fult á hædd við líknandi útlendsk bløð, bæði tá talan er um innihald og um pappírsgóðsku.

Aðalmunurin á Glaðing og hinum snotuligu útlendsku bløðunum á søluhillunum er bert tann, at Glaðing er skrivað á føroyskum, somuleiðis sum viðgjørdu evnini eru viðkomandi fyri føroyskar lesarar.

Glaðing er innihaldsliga fjølbroytt. Tað viðger lagnusøgur, átrúnað, uttanríkispolitikk umframt, at tað eisini inniheldur portrett og annað líkandi.

Fyrsta útgávan av Glaðing hevur millum annað eina grein, sum kallast »Á deyðans egg«. Hetta er ein søga um ein ungan føroying, sum brádliga gjørdist so sjúkur í lungunum, at hann reið á eggini millum lív og deyð.

Eisini skrivar blaðið um myndir av naknum føroyskum gentum á internetinum.

### Tørvur á øðrvísi blað

Teir fimm journalistarnir, ið standa aftan fyri Glaðing, siga eina av orsøkunum til nýggju útgávuna vera, at teira meta tørv vera á einum alternativi til verandi fjølmiðlar í Føroyum. Einum fjølmiðli, sum er øðrvísi. Og júst Glaðing meta teir vera øðrvísi.

Í oddagreinini í blaðnum verður sagt, at tað ber til at viðgera ymsu søgunar í Glaðing ørðvísi enn aðrir fjølmiðlar, júst tí, at talan er um eitt mánaðarblað. Tað ber til at leggja eitt dygarbetri journalistiskt arbeiði í tilfarið, arbeitt verður við.

Eisini siga teir fimm journalistarnir í oddagreinini eina aðra orsøk til, at teir eru farnir undir uppgávuna vera, at tað er spennandi og hugaligt at arbeiða við tilfari, sum ikki skal prentast ella sendast út í luftina um ein hálvan tíma.

### Journalistisk dygd

Tað er okkara mál, at tilfarið, bæði skrivliga tilfarið og myndatilfarið, verður oman fyri tað, vit eru von við í gerandisdegnum, Afturfyri verða strong krøv sett teimum, sum skriva blaðið. Somuleiðis verða strong krøv sett til myndirnar í blaðnum. Um málið er eydnast, ella um tað fer at eydnast, kann lesarin sjálvur gera av. Vit vilja í hvussu er gera okkara, siga teir fimm journalistarnir.

Teir fimm journalistarnir, ið geva Glaðing út, eru Kári Mikkelsen, Grækaris Djurhuus Magnussen, Kári Durhuus, Ólavur Rasmussen og Per Højgaard. Blaðstjóri er Grakaris Djurhuus Magnussen.

Sætti stigtakarin er Dánjal Pauli Davidsen, sum er útbúgvin cand. merc. í marknaðarføring og millum annað hevur starvast við marknaðarleiðslu á Berlingske Tidende og Det Fri Aktuelt.

Glaðing er greitt til prentingar á Sosialinum og prentað hjá ROTAROTA í Danmark.

# Skeiðsmiðdepil í Miðbýnum

*Menninir aftanfyri handilin Mega í Miðbýnum í Havn, eru hava nú á ovaru hæddini í handilshølunum innrættað høli til skeiðvirksemi. Sjálvir siga teir, at hóast talan er um mega stóra íløgu, so eru vónirnar góðar, tí lngu nú hava fólk víst áhuga*

DAGFINN OLSEN

KT vinnan er fyri øgiligari menning og innan hesa vinnu síggjast alt fleiri virki og fyritøkur av ymsum slag.

Handilin Mega í Miðbýnum í Havn hevur fingist við at selja teldur og telduútgerð. Nú hevur fyritøkan tikið eitt náttúrligt stig afturat og er farin undir skeiðvirksemi, har fólk kunnu læra at nýta teldurnar.

Mark Joensen frá Mega sigur, at hetta við skeiðvirksemi ikki er nýtt fyri teimum. Men áður hava teir leigað seg inn í skúlar og aðrastaðni og ymsir vansar hava verið við hesum. Tí hava teir nú stovnað KT-Centrum, ið stendur fyri skeiðvirkseminum.

Mark Joensen sigur, at fleiri fyrispurningar hava verið um skeið frá bæði privatfólki og stovnum og fyritøkum.

### Tendra og sløkk skeið

Tí fóru teir undir KT-Centrum. Møguleiki er at taka teldu koyrikort, internetskeið og sonevnd temdra og sløkk skeið til nýbyrjarar, men eisini eru skeið fyri royndar teldunýtarar.

Skeiðini eru ætlað til bæði fyritøkur, privatpersónar og familjur.

Útgerðin er góð í sera hugnaligu høkunum. Hewlett Packard útgerð í 1. flokki og 19 tumma teldurútar onframt uppvørpu og sooround sond. 10 pláss eru og tað verður mett at vera hóskandi.

Internet sambandið koyrir sera skjótt og sum heild manglar einki, tá tað ræður um tøkni í nýggju hølunum hjá KT-Centrum.

### Marglati

Og fyri veruliga at seta prikin yvir i'ið, so er avtala gjørd við matstovuna Rio Bravo, ið er nærhendis. Skeiðluttakarar kunnu so strekkja beinini og spáka oman at fáa sær ein bita í marsteðginum. Ætlanir eru eisini um skeiðpakkar til familjur, sonevndir vikuskiftispakkar, har gist verður á gistingarhúsi. Hetta er tó ikki komið í rættlag enn.

KT-Centrum byrjar í dag og hóast talan er um eina MEGA stóra íløgu, sum stigtakararnir skemtandi taka til, so eru vónirnar góðar, tí fólk hava longu víst áhuga.

**TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR**

**Móttøka**

Tann 1. juli 2000 eru 60 ár liðin, síðan Samtakið Tryggingarsambandið Føroyar byrjaði virkið sítt. Feløgini í Samtakinum vórðu løgd saman frá 1. januar 1998 at rokna við navninum Tryggingarfelagið Føroyar.

Samstundis verður ættarliðsskifti í stjórnini. Forstjórin Jens Peter Arge fer frá, og Gunnar í Liða tekur við sum forstjóri.

Í hesum sambandi verður bjóðað til almenna móttøku á høvuðsskrivstovuni á Kongabrúnni fríggjadagin tann 30. juni 2000 frá kl. 15 til 18.

Øll eru hjartaliga vælkomin

Tryggingarfelagið Føroyar

Saltangará · Tel 44 81 90
Klaksvík · Tel 45 61 90
Miðvágur · Tel 33 30 90
Tvøroyri · Tel 37 21 90
Vágur · Tel 37 38 90

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Kongabrúgvin
P.O.Box 329
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tel +298 345600
Fax +298 345601
tf@trygging.fo
www.trygging.fo